## *Arbeiðseftirlitið:*

# Arbeiðsumhvørvislógin

- Føroyar er framkomið samfelag, sum raðfestir arbeiðsumhvørvið ovarlaga til gagns fyri samfelagið, okkum øll.
- Arbeiðseftirlitið hevur ovastu umsjónina og vegleiðir arbeiðspláss kring landið.
- Hevur arbeiðsgevarin ampa av tær (ansar tú eftir tær), ella hevur tú sjálvur ampa av arbeiðinum.....
- Tað er ein sannroynd, at arbeiðsumhvørvið á teim ymsu arbeiðsplássunum eru rættuliga ólíkt. Men málið má tó altíð vera hitt sama, nevniliga eitt gott og trygt arbeiðsumhvørvi.
- Vit fara nú í stuttum at lýsa, hvat arbeiðsumhvørvislógin birtir undir, og hvussu trygdararbeiðið sambært lógini eigur at skipast.

## Uppgávan hjá Arbeiðseftirlitinum

**Sum nevnt í §1, er uppgávan hjá Arbeiðseftirlitinum , bæði at hava eftirlit og vegleiða, hetta við at arbeiðseftirlitið kemur á arbeiðspláss bæði ófráboðað og eftir áheitan.**

**Arbeiðseftirlitið verður mangan roknað sum ein mótpartur heldur enn ein samstarvsfelagið, og tað er stórt spell – soleiðis eigur tað ikki at vera.**

### Arbeiðsumhvørvislógin

Endamálið við lógini er at
1) virka fyri einum tryggum og heilsugóðum arbeiðsumhvørvi, sum altíð er í samljóð við teknisku og sosialu gongdina í samfelagnum,
2) skapa grundarlag fyri, at virkini sjálv kunnu loysa sínar trygdar- og heilsuspurningar eftir vegleiðing og í samstarv við feløgini á arbeiðsmarknaðinum, og vegleidd av Arbeiðseftirlitinum, sum eisini hevur ovastu umsjónina við at lógin verður hildin.

Vert er at hava í huga, at tað eru virkini sjálv, ið skulu loysa sínar trygdar- og heilsuspurningar.

### Arbeiðsgevarin

Arbeiðsgevarin skal síggja til, at arbeiðsviðurskiftini, hvat trygd og heilsu viðvíkur, eru góð. Í hesum sambandi verður serliga víst til:
1) Útinnan av arbeiðinum.
2) Arbeiðsplássið.
3) Tøknilig hjálpartól.
4) Evni og tilfar.

### Arbeiðsleiðarin

Arbeiðsleiðarin skal virka fyri at arbeiðsviðurskiftini á hansara øki eru fult forsvarlig. Hann skal eisini síggja til, at tiltøkini, sum gjørd verða fyri at betra um trygdar- og heilsuviðurskiftini á arbeiðsplássinum, virka eftir ætlan

Verður ein arbeiðsleiðari varugur við brek ella mangul, sum kann føra til vanlukku ella sjúku hjá arbeiðsfólki, so skal hann beinanvegin síggja til, at neyðug tiltøk verða framd fyri at forða fyri hesum. Fær hann ikki loyst trupulleikan á staðnum, tá skal hann beinanvegin siga arbeiðsgevaranum frá støðuni.

### Arbeiðsfólkið

Arbeiðsfólkið skal virka fyri, at arbeiðsviðurskiftini, hvat trygd og heilsu viðvíkur, eru fult forsvarlig innan hvørt arbeiðsøki sær, og íroknað eru tey tiltøk, sum verða gjørd fyri at fremja trygdina og heilsuna, at hesi virka sum ætlað.

Verður arbeiðsfólk varugt við brek ella manglar, sum kunnu vera til vanda, og sum tey sjálv ikki eru før fyri fyribyrgja, skulu tey straks boða onkrum í trygdarskipanin frá.

Har ið tað vegna útinnan av einum arbeiði, eitt nú við umvæling ella umsiting, fyribils er neyðugt at taka burtur trygdartiltøk, skal serliga ansast eftir, at hetta ella hesi tiltøk straks aftur verða sett í verk aftan á at umrødda arbeiðið er liðugt, ella at eins góð verndartiltøk verða gjørd at uppfylla tørvin.

### Skipa trygdararbeiði

Í kunngerðini frá 4 september 1995 um trygdararbeiði á virkjum og arbeiðsplássum eru greiðar reglur um hvussu trygdararbeiði skal skipast á øllum føroyskum arbeiðsplássum.

Kunngerðin ásetir, at á øllum virkjum og arbeiðsplássum, har ið 10 ella fleiri arbeiða, skulu trygdarumboð veljast, og trygdararbeiðið skipast.

Arbeiðseftirlitið er tó av teirru áskoðan (við lóg hond), at á smærri virkjum og arbeiðsplássum er eisini neyðugt við einum ávísum trygdararbeiði, so at hesi fólkini í mest møguligan mun verða vard ímóti skaða og vanlukku.

**Smá arbeiðspláss:** á smáum virkjum (1-4 fólk) eigur trygdararbeiði at verða loyst við persónligum sambandi ímillum fólkið og leiðsluna.



***Luttakarar á trygdarskeiði hjá Arbeiðseftirlitinum apríl 2009:*** *Christian Sofus Christiansen, Eivind D. Hansen, Eivind Olsen, Finnbogi Hellisfoss, Fróði Guttesen, Hallur Mikkelsen, Jóhan Medardus Jacobsen, Kári Weihe, Mette Nygaard, Ólav A. Olsen, Svein Thomsen, Sven Nørspang, Thomas Finn Johannesen*

**Miðal arbeiðspláss:** Á miðal stórum arbeiðsplássum (5-9 fólk) er týdningarmikið at trygdararbeiðið kemur í fastar karmar. Tó tað tað ikki beinleiðis er kravt, er tað góð loysn, at álitismaður tekur sær av trygdararbeiðinum.

Tað er týdningarmikið at trygdararbeiðið gongur eftir somu grundreglunum sum fyri størri virkini.

**Stór arbeiðspláss:** Á arbeiðsplássum við 10 ella fleiri fólkum, skal arbeiðið við atlit til trygd og heilsu samskipast. Hetta verður m.a. gjørt við val av trygdarumboði (um). Eftir hetta val skipa arbeiðsleiðari og hann ein trygdarbólk. Slíkir bólkar skipast fyri tað ávísa arbeiðsøkið. Er talan um eitt størri arbeiðspláss, har 20 ella fleiri fólk arbeiða, skal trygdarnevnd skipast. Er so talan um, at tað á arbeiðsplássinum eru ein ella tveir trygdarbólkar, so skulu limirnir í hesum bólki ella bólkum saman við arbeiðsgevaranum, ella einum umboði fyri henda og sum hevur ábyrgdina av arbeiðsplássinum, skipa trygdarnevndina. Hetta førir við sær, at nevndin við einum trygdarbólki fær 3 limir. Og á virkjum við 2 trygdarbólkum verður møguleiki fyri at skipa størrru trygdarnevndina eftir lógini við 5 limir. Eru fleiri trygdarumboð/ -leiðarar enn trygdarnevndin skal hava, koma trygdarumboðini at velja nevndarumboðið(ini) sínámillum, og somuleiðis leiðararnir. Um tað ikki eydnast leiðarum at semjast, so útnevnir arbeiðsgevarin umboðið. Hesir 4 valdu limir skipa so, saman við arbeiðsgevaranum, ella umboði hansara, trygdarnevndina, ið soleiðis fær 5 limir. Í Arbeiðsumhvørvislógini er ásett, at trygdarnevndin skal fyriskipa, leiða, ráðgeva og hava eftirlit við øllum trygdar- og heilsuliga arbeiðinum á virkinum.

### Hvør kann veljast til trygdarumboð?

Valbarið til trygdarumboð er vanliga avgjørt við ásetingunum, ið galda fyri val av álitisumboð á samsvarandi sáttmálaøki.

Álitismannaskipanin hevur vanliga serligar ásetingar um starvsaldur, førleikar vm. Í sáttmála kunnu vera serlig krøv, ið skulu lúkast fyri at persónurin er valbarur. Hóast ein hevur rætt til at luttaka á valinum, so er hetta nevniliga ikki einstýðandi við, at hesin eisini kann verða valdur.

At álitismannareglur verða nýttar, útilokar ikki, at ikki-limir í fakfelag eisini kunnu veljast til trygdarumboð. Tað geldur bæði á fyritøkum / virkjum, har einans eru óorganiserað starvssett – ella starvssettt, sum ikki eru limir í júst tí fakfelagi, sum hevur sáttmála, - og í teim førum, at tað bæði eru starvssett organiserað og starvssett óorganiserað.

Nýtsla av álitismannaskipanini ger ikki, at krøv setast um, at tann valdi skal vera limur í fakfelagi.

## Framtíðin er longu í dag

**Sum arbeiðsumhvørvislógin fyriskrivandi byrjar, so eiga vit øll at virka fyri einum tryggum og heilsugóðum arbeiðsumhvørvi, sum altíð er í samljóð við teknisku og sosialu gongdina í samfelagnum.**